Aksel V. Johannesen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur viðvíkjandi radara, settur Jenisi av Rana, landsstýrismanni við uttanríkis- og mentamálum (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvussu ofta og nær hevur Jenis av Rana, landsstýrismaður, tosað við danska verjumálaráðharran, Trine Bramsen, um møguliga uppseting av hernaðarradara í Føroyum – antin á vanligum fundi, teldufundi ella gjøgnum telefon?
2. Hvat hevur landsstýrismaðurin fingið at vita frá danska verjumálaráðharranum um møguliga uppseting av hernaðarligum radara í Føroyum?
3. Hvat hevur landsstýrismaðurin sagt við danska verjumálaráðharran um møguliga uppseting av hernaðarligum radara í Føroyum?
4. Nær ætlar landsstýrismaðurin at ráðføra seg við Uttanlandsnevndina um málið viðvíkjandi møguligari uppseting av einum hernaðarligum radara í Føroyum?
5. Hvussu heldur landsstýrismaðurin, at tað samsvarar við § 54 stk. 2 í stýrisskipanarlógini, at hann framvegis ikki hevur ráðført seg við Uttanlandsnevndina um hetta stórmál, hóast hann, gjøgnum langa tíð og fleiri ferðir hevur tosað við donsku stjórnina um møguliga uppseting av einum hernaðarradara í Føroyum?
6. Fer landsstýrismaðurin at loyva danska verjumálaráðharranum og fólki hennara at geva Uttanlandsnevndini ta kunning, tey kunnu geva, um møguliga uppseting av einum hernaðarligum radara í Føroyum?

Viðmerkingar:
Danska stjórnin hevur boðað frá, at hon heldur tað vera neyðugt at seta upp ein hernaðarligan radara í Føroyum til tess at kunna hava eftirlit við flogferðsluni í føroyskum loftrúmi.
Vit hava ongan hernaðarligan útbúnað havt í Føroyum síðani radararnir á Sornfelli blivu sløktir, og tí er hetta eitt sera stórt og prinsipielt mál.

Tað er komið fram í fjølmiðlunum, at danski ráðharrin á økinum, Trine Bramsen, hevur kunnað Jenis av Rana, landsstýrismann, um málið fleiri ferðir. Seinast í januar 2021.[1] Men tað er Løgtingið, sum skal taka støðu til hetta, og sum skilst hevur Uttanlandsnevndin, har spyrjarin júst hevur tikið sæti, framvegis onga veruliga kunning fingið um málið.

Í drúgvum svari uppá fyrispurningar frá Sjúrði Skaale, fólkatingsmanni, um málið tann 8. desember, segði danski verjumálaráðharrin m.a. soleiðis:
"Det er vigtigt med færøsk inddragelse i udformningen af de dele af oplægget, der vedrører Færøerne. Og det er vigtigt, at et eventuelt ønske om at opstille en radar på Færøerne bliver baseret på en fælles forståelse mellem Færøerne og Forsvarsministeriet.
Derfor har jeg løbende haft dialog – både telefonisk og fysiske møder – med Færøernes landsstyremand for udenrigsanliggender, Jenis av Rana. (…) Vurderer han, at der skal inddrages øvrige myndigheder på Færøerne, så vil jeg lytte til det. Ligesom jeg også gerne mødes med Lagtingets udlandsudvalg, såfremt Jenis av Rana vurderer, det kunne være hensigtsmæssigt."[2]

[1] http://www.vp.fo/news/avgerdina-hevur-jenis-av-rana
[2] https://www.ft.dk/samling/20201/almdel/f%C3%A6u/spm/2/svar/1735108/2317635.pdf

Eftir hesum at døma er stjórnin sinnað til bæði at upplýsa um málið, og at koma í ein dialog við føroyskar myndugleikar um málið. Higartil hevur henda kunning og hesin dialogur kortini bert verið við Jenis av Rana, landsstýrismann, og tað kann vera rættiliga óheppið í einum so stórum og prinsipiellum máli, og spurningurin er, um tað samsvarar við grein 54 í stýrisskipanarlógini. Tí verða hesir fyrispurningar settir.

Á Løgtingi 22. januar 2021

Aksel V. Johannesen